**Skal nakar kritikkur setast móti SummarFestivalinum, so má tað vera, at hálvur annar tími við Dynamitt er for lítið**



# Ov lítið av

SUMMARFESTIVALUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var kanska ikki føroyska summarið frá síni allarbestu síðu, men tað var nú heilt nær við kortini. Í øllum førum varð '09-útgávan av SummarFestivalinum ikki rakt av ævigu avlýsingunum, sum veðurgudarnir hava plágað festivalin við seinnu árini, og so var tað av álvara lagt upp til eitt brak á Vágsbøi og har um leiðir.

Hundraðtals campingvognar og bátar, tvey fullsett tjaldpláss og annars hópin av privatum seingjarplássi hjá altíð fyrikomandi klaksvíkingunum vóru karmur um ein festival, sum helst má roknas sum største tónleikatiltakið nakran tíð í Føroyum.

Tí hóast familjuhugni, prát við gamlar vinir og reyp annars er partur av tí, sum ger SummarFestivalin til nakað fyri seg, so er tað fyrst og fremst tónleikurin, sum er í miðdeplinum.

## Framúr undirhald

Av øllum tí, sum var á teimum ymsu pallunum, man tað bara vera eitt navn, sum kann bólkast undir "vónbrot". Gibburin úr Bee Gees skuldi vera heilt stóra upplivingin, men ta uppgávuna megnaði hann so slettis ikki at lyfta. Vit sóu og hoyrdu, at maðurin er ein fantastiskur sangskrivari, men vit fingu eisini prógv um, hví hann so ofta hevur latið onnur framført mongu dýrgripirnar hjá sær.

Men tá so er, so er tað fantastiskt at vita, hvussu ríkur føroyskur tónleikur er. Og ikki minst, hvussu góðar upplivingar føroyskir tónleikar-ar kunnu geva okkum. Sum uppliving er væl einki, ið er størri enn svøku Dynamitt-dreingirnir. Hesa ferð varð talan enntá ikki um nakra annonsering av, at hetta var seinasta framførslan. So hvør veit, um teir ikki longu nú eru í ferð við at fyrireika, hvat skal henda í august mánað í 2010. Í øllum førum er nær við, at teir skulu titulerast sum fast festivalorkestur, og lat so fara, at teir kanska ikki eru verðsins bestu tónasmiðir og ella tónleikarar. Sum dansibólkur vóru teir framúr á sinni, og við trimum festivalupptraðkanum hava teir við sjeytumma seymi sligið fast, at teir eru eru og verða besti live-bólkurin, sum Føroyar hava. At Páll Finnur Páll so er í ferð við at hótta hesa støðuna, er bara fínt, og hví ikki lata tað koma ann upp á eina roynd við eini dupult-konsert fríggja- ella leygarkvøldið.

## Nostalgi í fyrsta potensi

Nostalgi – ella afturhvarv – er eisini nakað av tí, sum SummarFestivalurin hevur gjørt til sítt vørumerki.

Og heldur ikki hesa ferð kiksaði Festivalurin í hesum. Einki av hesum var størri enn ABBA the Show. Mest sum vemmiliga 70'araslig við strømmum draktum, sum vóru opaðar somikið, at bringuskeggið kagaði undan. Nostalgi fyri allar pengarnar. Tónleikur fyri allar pengarnar. Og stemningur fyri allar pengarnar.

Legg so ein Sámal Ravnsfjall í stórformi afturat pakkanum, sum eisini inniheldur Terja Rasmussen, Frændur og Anfinn Nielsen fyri bara at nevna nakað, og tú hevur eina summaruppliving langt yvir tað vanliga. Bert spell, at listin við føroysku perlunum er somikið langur, at menn sum Anfinn og Frændur noyðast at spæla á alljósum degi. Meini so við, at skulu timbermenn reparerast ordiliga, og skal matur gerast til húsfólkið, so kann tíðin verða ein knappur faktorur. Men ekstremt rockaða útgávan av Útsalg setti tó klokkuna í stað eina løtu, tá Anfinn lat Mikkjal Hvannastein folda seg heilt út.

Og so var tað ein ordiligur góðbiti, sum varð goymdur til tað



*Fyrstu ferð, eingangsknall og Two Hearts fluttu tankarnar aftur til 80'ini, áðrenn kósin at enda varð sett móti fesku suppuni, sum bíðaði heima. Chase flutti veruliga mørk í føroyskum tónleiki í síni tíð, og talan var um flott og nostalgiskt punktum, sum varð sett leygarkvøldið*

Mynd: Jens Kristian Vang